# 1-16 í Letlandi



Alex Santos og B36 noyddust at leggja rygg til ein lemjandi 1-8 ósigur í Letlandi Ólavsøkudag

**Tað var ein ordans sekkur, ið B36 og B68 koma aftur við, eftir at tey bæði liðini høvdu verið í Letlandi Ólavsøkudag og spælt UEFA-Cup dystir**

UEFA CUP

*Terji Nielsen,*
*terji@sosialurin.fo*

Bæði B36 og B68 høvdu avskrivað sínar møguleikar undan fráferðini úr Føroyum, og hetta var eisini høvuðsorsøkin til, at feløgini í felag valdu ikki at fara til Letlands fyrr enn á sjálvum leikdegnum. B36, ið dystaðist við letlendska oddaliðið Metalurgs, hevði tapt 1-3 á Tórsvølli, meðan toftamenn høvdu tapt 0-3 á Svangaskarði móti Ventspils tvær vikur frammanundan dystirnar í Letlandi.

## Metið varð hótt

Størsta ósigurin í Europa-Cup samanhangi, ið nakað føroyskt felag nakrantíð hevur verið fyri, var tann hjá HB, tá ið teir í nítiárunum taptu heili 0-10 fyri norska felagnum Tromsø, ið tá hevði ein vælupplagdan Tore Andre Flo sum fremsta álopsmann.

Ólavsøkudag var nær við, at HB slapp av við ivasama heiðurin at eiga hetta met, tí bæði B36 og B68 fingu ein ordans bank. Serliga hjá B36 sá tað alt annað enn gott út, tí Metalurgs legði bragdliga fyri, og longu tá ið ein hálvur tími var leiktur, høvdu letlendsku vertirnir lagt seg á odda heili 4-0! Støðan gjørdist ikki betur av, at Metalurgs megnaði at skora tvær ferðir afturat fyri hálvleik, soleiðis at hálvleiksstøðan var heili 6-0 til letlendska liðið. Serliga var tað ein leikari hjá Metalurgs, Katasonov, ið gav havnarmonnunum grá hár í høvdið, tí hann skoraði ikki minni enn fýra av teimum seks málunum hjá Metalurgs í fyrra hálvleiki. At onkur B36'ari kanska hevur hugsað, at teir nú fóru at yvirtaka metið frá grannunum, man lítið verða at ivast í, men tíbetur fyri teir svørtu og hvítu fingu teir vent gongdini eftir steðgin.

Fyrsta hálva tíman eftir hálvleikssteðgin megnaðu letlendsku vertirnir ikki at skora, og fyrsta málið í seinna hálvleiki fekk B36. Tað skoraði landsliðsleikarin Johannus Joensen, sum í einari offensivari satsning bleiv sendur heilt fram á vøllin. Hetta mál kom, tá ið seinni hálvleikur var 28 minuttir gamal. Leikararnir hjá Metalurgs svaraðu tó skjótt aftur, og tá bert fimm minuttir seinni høvdu teir økt tvær ferðir.

## Toftamenn eisini avsmurdir

Eisini B68 noyddist at leggja rygg til eitt stórtap. Toftamenn høvdu í mun til B36 eisini ein langan busstúr á skránni, tá ið komið var til Letlands, og tað hevur neyvan økt um møguleikarnar hjá teimum.

Í mun til manningina hjá B36 hava teir á B68-liðnum ikki tær stóru altjóðu royndirnar, og B68 bleiv sent til hús aftur við einum 0-8 tapi. Verjan hjá B68 megnaði at halda tørn fyrsta korterið, men tá ið 17 minuttir vóru leiktir, fekk Ventspils-framherjin, Bicka, sett hol á. Stukalinas skoraði til 2-0 aftaná 33 minuttir, og tveir minuttir økti Rimkus, ið skoraði øll trý málini á Svangaskarði til 3-0, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Í seinna hálvleiki økti Ventspils beinanvegin til 4-0, og tá ið liðugt var, hevði letlendska heimaliðið skorað ikki færri enn átta mál, meðan toftamenn einki mál høvdu fingið. Eitt tað mest merkisverda er, at tað vóru átta ymiskir leikarar á letlendska liðnum, ið skoraðu tey átta málini.

## Ivasamur hugburður

Nógvar røddir hava verið frammi um, at tað er ógvuliga óseriøst av bæði B68 og B36 at ikki verður farið til Letlands fyrr enn á sjálvum leikdegnum. Nú ber so til at líta aftur um bak, og ikki kann sigast annað, enn at úrslitið neyvan kundi verið verri. Gamaní spara feløgini nógvar pengar upp á, at tey ikki skulu gjalda fyri gisting og annað, ið er í sambandi við eitt uttanlandsuppihald.

Bæði feløgini søgdu fyrr í vikuni, at hevði útgangstøðið verið eitt annað, høvdu tey óivað farið av landinum nakrar dagar frammanundan, men sum støðan var, bleiv valt at fara á sjálvum leikdegnum. Nú kann man so spyrja seg sjálvan, hvørja ávirkan tað hevur á umdømi hjá føroyskum fótbólti, at feløgini velja slíka loysn og koma aftur við teimum úrslitum, sum B36 og B68 fingu á stuttu vitjan síni í Letlandi. Tá ið HB setti metið við største ósigrinum, var júst sama loysn vald við nógvari ferðing á sjálvum leikdegnum, og millum annað var núverandi venjarin hjá B36 millum leikararnar á HB-liðnum tá, so hann eigur at kenna til tað.



*vandamikli framherjin hjá Ventspils, Rimkus, var aftur á blettinum hósdagin, tá ið toftamenn taptu 0-8 í Letlandi*

**Ventspils-B68 8-0(3-0)**
1-0 Bicka 17.
2-0 Stukalinas 33.
3-0 Rimkus 43.
4-0 Rekhviashvili 47.
5-0 Smirnovs 56.
6-0 Butriks 71.
7-0 Krohmer 85.
8-0 Agafonov 88.

**Metalurgs-B36 8-1 (6-0)**
1-0 Dobrecovs 2.
2-0 Katasonov 18.
3-0 Solonicins 29.
4-0 Katasonov 30.
5-0 Katasonov 34.
6-0 Katasonov 42.
6-1 Johannus Joensen 73.
7-1 Lukosvicius 77.
8-1 Grebis 78.




## Dagrøktari

Dagrøktarskipanin í Klaksvíkar Kommunu søkir eftir dagrøktarum. talan er um avloysarastørv í ávíkavist 1/2 ár og 1 ár.

**Vit ynskja at tú**
- hevur hegni og áhuga, at arbeiða við børnum
- kann geva børnunum ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag
- ert fyritakssamur og skapan
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- kann samskifta við foreldrini
- ert sinnaður at samstarva við starvsfelagar og sosialu deild.

Í heiminum má vera rúm til børnini at spæla í, og økið við girðing uttanfyri.

Vit kunnu bjóða eitt inspirerandi og lívsjáttandi starv við børnum.

Dagrøktarskipanin er ein stovnur undir sosialu deild hjá Klaksvíkar kommunu. Í skipanini starvast 26 dagrøktarar og 2 námsfrøðingar. Talið av børnum í dagrøkt er 120. Ein fastan dag aðru hvørja viku eru 3 dagrøktarir saman við børnum í spælistovuni.

Arbeiðstíðin er millum kl. 7.30-17.15. Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu sendast til Klaksvíkar kommunu, Postboks 2, 700 Klaksvík í seinasta lagi 15. august 2004.**

Meir fæst at vita við at venda sær til Sigrun Vágstún, dagrøktarleiðara ella Jórun Niclasen, samskipara á tlefon 41 00 00.

**Klaksvíkar kommuna**
Postboks 2 · 700 Klaksvík

ÚTSØLAN
BYRJAR MÁNADAGIN 2.AUGUST KL.10.00
opið er til kl.20.00
[TEIR] & [TARA]
Á HÁLSI · STARAVEGUR 9
TÓRSHAVN · TEL 322202
Sosialurin 341800

KEYP SPORTSFELGUR...





LÆTT OG TRYGT
...við dekkum á alnótini
WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA · TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22
Sosialurin 341800

MIÐSTØÐIN FO-650 Toftir

## Skrivstova/Bókhald

– – –
Hálvtíðarstarv – 22 1/2 tímar/viku

Søkt verður eftir einum fólki til skrivstovu okkara á Toftum at byrja skjótast tilber. Starvið er ætlað sum eitt 'systur'-starv til eitt verandi 1/2-tíðar starv, soleiðis, at skrivstovan er mannað 45 tímar um vikuna.

Arbeiðið fevnur um telefon-kundarøkt, bókhald og annað skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarar skulu hava útbúgving innan handil, bókhald ella tilsvarandi. Eisini royndir við teldum, bókhaldsskipanum og skrivstovuarbeiði geva fyrimun.
Álit, nærlagni, góð samstarvsevni og arbeiðsemi verður sett í hásætið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kára í Garði, stjóra,
T-post: kari@kassi.fo
Telefon: 449952 / 219952

Umsóknarfreistin er 10. august. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsókn við C.V. og prógvum skal sendast til:

**Miðstøðin P/F**
Att: Kári í Garði, stjóri
Bryggjan
FO-650 Toftir

Miðstøðin P/F er eitt 9 ára gamalt partafelag, íð veitir tænastur til fiskivinnuna. Vit hava í miðal 7 ársverk umframt undirveitarar. Miðstøðin hevur høvuðsgoymslu og skrivstovu á Toftum. Á skrivstovuni starvast 3 fólk.
Á skrivstovuni arbeiða vit við
Navision Atain
HeimaBanka
MS Office
TRM Total view

Gallarí Jinx





Hergerð Joensen
Framsýning í august 2004
tel 317101 · jinx@jinx.fo

## Arkitektur og Byggifrøðingur

Søkt verður eftir einum arkitekti og einum byggifrøðingi.

Arbeiðsuppgávurnar umfata um- og nýbyggingar, har Teknistovan veitir ráðgeving fyri almennar og privatar byggiharrar, alt frá programskrivum, skitsu- og høvuðsprojekteringum til eftirlit og avhendan av bygningum og økjum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal í minsta lagi hava 5 ára praktiskar royndir frá líknandi arbeiði, skal hava góð samstarvsevnir og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setunarviðurskiftir**
Løn og setanartreytir verða eftir nærri avtalu.

Umsókn við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skula vera inni áðrenn 20. august 04.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skula sendast til.

TEKNISTOVAN
v/ Eyðun Petersen arkitektur
Torvgøta 1 600 Saltangará
Tlf 44 80 05 Far 21 93 94 Fax 44 80 50

LANDSSTEVNA
JAVNAÐARFLOKKSINS
Verður í Havn
24. - 25. sept.
Føroya Javnaðarflokkur






Sosialurin 341800

## Summarfrí

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí viku 32, 33 og 34.

**Havnar Handverkarafelag**